# Vegleiðing at biðja um heimild í innlatingarskipanini hjá Skráseting Føroya

Í fyrstu atløgu verður bert møguligt at lata **fráboðan um eigarar** inn gjøgnum innlatingarskipanina, men skjótt verður møguligt at lata ársfrásagnir inn hendan vegin eisini.

Fyri at kunna brúka skipanina skal ein innrita við samleikanum.

Tey, sum eru skrásett sum stjórar í feløgum, hava heimild at lata skjøl inn fyri hesi feløgini.

Onnur (t.d. grannskoðarar, advokatar og bókhaldarar) kunnu rita inn við sínum samleika og søkja um heimild at lata inn fyri øll feløg. Hendan umbønin skal síðan góðkennast av einum stjóra í felagnum.

Møguligt er at søkja um tríggjar ymiskar heimildir:




Tá søkjast skal um heimild at lata inn fyri feløg, har ein ikki er skrásettur sum stjóri, verður hetta gjørt umvegis ”Uppseting” og síðan ”Mínar heimildir” – sí mynd:



Umbið nýggja heimild við at trýsta á bláa knøttin ”Umbiðja nýggja heimild”



# Heimildir

Persónar kunnu bert lata inn fráboðanir um teir hava heimild at lata inn fyri felagið.

Til dømis, so eru tað bert stjóri á virki sum kann lata inn eigarafráboðan fyri eitt virki til Skráseting Føroya.

Tó er møguligt at umbiðja hesa heimild, sum síðani verður virkin um hon verður góðkend av stjóranum.Niðanfyri sæst yvirlit yvir tær heimildir, sum tú hevur umbiðið.

Ein frágreiðing sæst fyri hvørja av kolonnunum við at halda músina yvir kolonnu-navnið.

Leita

Dagfør yvirlit

Umbiðja nýggja heimild

| STØÐA | STOVNA | SKOÐA | LOYVI | STOVNUR | PERSÓNUR | FELAG | SLAG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|

Útfyll teigarnar – sí mynd/dømi – og goym umbønina:



## Stovna heimild

Á hesum skerminum er møguligt at stovna eina nýggja heimildarumbøn. Tá umbønin er skrásett, so skal hon fyrst góðkennast av stjóranum, áðrenn hon verður virkin.

Vegleiðing er til hvørt av virðunum niðanfyri, og sæst hendan við at halda músina yvir feltið.

Stovnur *
Skráseting Føroya

Felag *
BankNordik, P/F

Slag *
Eigaraskrá

Loyvi
- ○ Umbið heimild at lesa innlatingar fyri felag
- ◉ Umbið heimild at lesa og stovna innlatingar fyri felag
- ○ Umbið heimild at lesa og stovna innlatingar, umframt góðkenna umbønir

Viðmerking

Avbrót

Goym